# UPPGÁVA 2E

## Álvarslig ferðsluvanlukka við fartelefon

Tit skulu gera eina søgu um vanlukkuna

- Byrjið við at lesa greinastubban um vanlukkuna
- Persónarnir í vanlukkuni eru persónarnir, sum tit hava gjørt
- Tit skulu greiða frá, hví kvøldið hjá teimum endaði soleiðis

**Søgan, sum tit gera, skal svara hesum spurningum:**

- Hvør var partur av vanlukkuni?
- Hvør sat hvar í bilinum?
- Vóru tey íbundin trygdarbelti?
- Hvussu kendu tey bilføraran?
- Hví koyrdu tey bil?
- Hví sendi bilførarin sms, meðan hann koyrdi?
- Hvat gjørdu hini í bilinum, meðan bilførarin sendi sms?
- Hví var tann fjórði persónurin ikki við í bilinum?
- Hvat kundi forðað vanlukkuni?

Søgan skal passa til teir fýra persónarnar, sum tit hava gjørt.

### Álvarslig ferðsluvanlukka við fartelefon

Leygarnáttina var ein álvarslig ferðsluvanlukka við ungfólki. Øll fýra fólkini í bilinum vórðu flutt á Landssjúkrahúsið til kanningar. Vakthavandi á politistøðini sigur, at tvey teirra eru álvarsliga skadd, og tvey hava fingið smásnuddir.

Bilførarin, ein 18 ára gamal maður, misti tamarhaldið á bilinum. Vitni greiða frá, at hetta hendi, meðan hann sendi eitt sms. Einki bendir á, at bilførarin var ávirkaður av rúsdrekka, men hetta verður nú kannað, verður sagt av politistøðini.

betri
RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD
Tilfar brúkt við loyvi frá:
RÅDET FOR SIKKER TRAFIK